


# Powershopping í Esbjerg City

Ein innkeypstúrur í Esbjerg City býður upp á alt, sum hjartað fær hug á. Far á »powershopping« í handlum og vøruhúsum ella far ein túr gjøgnum longstu gongugøtu í Danmark.

Hanlarnir eru á tremur júst nú við tí síðsta nýggja í øllum teimum mongu spennandi litunum, og hava alt, tær nýtist í summar.

Í Kongensgade spennir vøruúrvalið hjá handlunum frá »brabdstiores« til minni serhandlar við einum spennandi úrvali. Kenn pulsin hjá stórbýnum, her sum mótahandlarnir liggja lið um lið við øðrum shoppingynskjum. Í Kongensgade finnur tú eisini handilsmiðstøðina Midt-i.

Í Torvgade finnur tú nógvar ymsar serhandlar. Kenn inntima stemningin av teimum mongu smáu ser- og matvRuhandlunum, sum liggja á rað í vøkru handilsgøtuni. I Trovgade ber til at keypa alt til gleði fyri eygað og góman.

Her finnurtú handlar, sum bara eru í Esbjerg. Í mongum av handlunum er tað eigarin sjálvur, sum stendur handan skivuna. Hetta gevur ein serligan persónligan dám, tá tú handlar.

Í City kanst tú sameina shoppingtúr við eina vitjan á teimum nógvu spennandi matstovunum og caféunum. Num summarið er komið, ýður av lívi á torginum. Caféirnar seta borðini út, og her eru allir møguleikar fyri at snúsa til pulserandi lívið fyrrpartin til seint út á kvøldið. Fá tær undir góman av mentan, tí her eru nógv spennadi tilboð á mentanarstovnunum. Hervið fær shopping eisini eina aðra dimensjón, og tú fært ikki bert fylt posan við lekrum vørum, men tú kanst eisini koma heimaftur við mentanarligum upplivinum.

Esbjerg City hevur okkurt at bjóða øllum, tá tað snýr seg um shopping. Handlarnir eru nógvir, og úrvalið er rættiliga briett, og er Esbjerg City við yvir 200 serhandlum, Danmaks longstu gongugøtu, matstovu- og caféum, eini handilsmiðstøð og vøruhúsi – ja so er Esbjerg City útsynningsdanmarks absolutti høvuðsstaður.

Ein shoppingtúrur er altíð ein uppliving – líka mikið hvør árstíðin er – kom sjálv og síggj, hvat hendir!



